# Andreas í Tarti farin, 101 ára gamal

Tað var við sorgblíðni, at eg fekk tíðindini um, at Andreas í Tarti úr Oyndarfirði var farin, 101 ára gamal.

Tá ið ein er komin so langt upp í aldri kann ikki roknast við meira enn einum degi í senn. Hinvegin var Andreas til tað síðsta eins klárur og skilagóður sum altíð.

Vit báðir komu ikki at kennast persónliga fyrr enn Andreas var 99 ára gamal. Men eg hevði hoyrt um hann sum ein framúr skilamann. Fyrst og fremst var hetta frá læknanum í Gøtu, svenskaranum Gunnar Bjørkmann, sum var sera hugtikin av Andreasi. Hann segði, at Andreas var ein av teimum mest spennandi persónum, hann hevði hitt.

Eisini var Andreas ein týdningarmikil kelda til Oyndarfjarða søgu, sum varð skrivað av systirdótrini, Freydis Poulsen. Onkuntíð høvdu vit eisini tosað saman í samband við tilfar í FF-blaðnum.

Hetta skapti so ein áhuga at fara til Oyndarfjarðar at fáa Andreas at greiða frá sínum lívi, so hetta kundi fáast á prent, áðrenn tað var ov seint.

Hetta var eitt hugtakandi upplivilsi. Andreas tosaði í fyrsta umfari upp á band stórt sæð uttan slit í tríggjar tímar. Tað var eitt heilt ótrúligt minni, sum hann hevði. Serliga greiddi hann frá sínum lívi til sjós. Hann fór til skips í 1921, og hann kundi rokna upp allar menninar, sum vóru við fyrsta túrin. Hetta var í deyðsiglaratíðini, tá einki var sum æt motorur ella telefonsamband, og tá ið vandin fyri als ikki at koma aftur var óhugnaliga stórur. Andreas mintist øll tey feigdarillveður, sum kostaðu so mongum fiskimonnum lívið.

Andreas kom so at uppliva alla menning í fiskiskapinum, og hann náddi eisini at uppliva línubátatíðina fyrst í 60-unum, sum tá var tað mest framkomna, sum kundi hugsast. Hann fór seinni at rógva út, gjørdist landformaður hjá útróðrarbáti og slepti ikki fiskiskapinum fyrr enn hann gekk á 85. ári. Hann hevur tískil verið við í fiskiskapi í heili 70 ár.



*Andreas og Malfryd á 100 ára føðingardegnum*

Hansara frásøgn varð fyrst prentað í fimm pørtum í FF-blaðnum. Tá blaðið varð steðgað, komu teir seinastu tríggir partarnir í Miðvikuni í Sosialinum.

Hetta gjørdist ein framúr frásøgn um lívið hjá einum vanligum fiskimanni á sjógvi og landi. Andreas var sera fegin um, at henda hansara søga kom uppá prent. Tað eru hansara lesarar eisini. Ikki minst var hetta gevandi fyri meg sjálvan. Tað var eisini stuttligt hjá Andreas at hitta altjóða kenda fiskivinnufrøðingin Menakhem Ben-Yami í 2006.

Tað ber framvegis til at lesa fyrstu fimm partar av frásøgnini hjá Andreas á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo. Farast skal inn á gomlu heimasíðuna, bløðini 375-379.

Hetta okkara samskifti gjørdi, at vit blivu vinir. Havi vitjað hann seinni, tá høvið var til tess. Seinast fyri tveimum mánaðum síðani. Tá var hann tann sami gløggi og blíði Andreas. Hann hevði tá vitjan av einum meira enn 90 ára gomlum systkinabarni úr Elduvík. Tað var ikki smávegis teir kundu práta um gamlar dagar.

Pápi Andreas var Mikkjal Andreassen, sum var av Hellunum. Hann misti mammuna sum smádrongur og kom í Tarti at vaksa upp hjá gummu síni. Mamman var Katrina Anthoniussen úr Ansastovu í Oyndarfirði. Gjøgnum hana var Andrias systkinabarn Harald Anthoniussen, hvørs fiskimannasøga eisini hevur verið í Miðvikuni.

Tey vóru ikki færri enn 12 systkin í Tarti. Andreas giftist í 1944 við Malfryd Joensen av Eiði f. 1921. Tey fingu børnini Bjarnhild, Amy, John Erling, sum doyði í 1994, Sigtór og Hallur.

Tey, sum kendu Andreas, geva honum øll besta ummæli. Teir sum vóru saman við honum til skips siga hann at vera ein framúr fittan og raskan skipsfelaga.

Hann fylgdi væl við í samfelagsviðurskiftum og hevði stóran áhuga fyri politikki. Tað var alment kent, at hann var íðin tjóðveldismaður. Tað setti eisini dám á hansara 100 ára føðingardag, at tingmanningin hjá flokkinum kom í føðingardag.

Men vit báðir komu ongantíð inn á politikk. Hevur helst ánað, at vit á tí økinum ikki drógu eina línu!

Tað var stuttligt og gevandi at kenna Andreas. Hann er ein, sum eg komi at minnast við takksemi.

**ó.**



## Minningarorð um

# Katrin Jovinu Skarðhamar

Góða Katrin. Tað var hart at fáa at vita at tú var álvarsliga sjúk, men vit vónaðu tað besta, og ynsktu at tú vildi blíva frísk aftur, men soleiðis skuldi tað ikki verða, tí boð vóru eftir tær alt ov tíðliga.

Vit gleddust yvir, at tú kom til Danmarkar, so at tú kundi fáa viðgerð og síðan koma til okkum í Herborg at koma fyri teg aftur, sum tú sjálv segði, sita í garðinum og bíða til klokkan bleiv 15.00, tí tá kom eg heim og vit kundu hugna okkum saman við kaffi, grilla, síggja børnini og hundarnar spæla í garðinum.

Tú var so glað, tá ið Heðin lánti bussin hjá Kessler og vit koyrdu ein langan busstúr, áðrenn vit koyrdu heim til Herborg. Tú sat í koyristólinum í garðinum og eygleiddi ommu- og langommubørn spæla við hundarnar, fortaldi okkum hvussu pent alt var, og hvussu lítið skuldi til fyri at blíva glað, tá ið man var so sjúkur.

Hvussu tú gleddi teg til eftir vikuskiftið, tá tú skuldi flyta heim til okkum í Herborg at verða ta síðstu tíðina.

Ommubørnini gleddust um, at tú skuldi koma og gjørdu alt fyri at tað skuldi eydnast, og alt skuldi verða klárt tá tú kom.

Leygarmorgunin var tú væl fyri, hugnaði tær saman við okkum øllum við morgunmatarborðið. Tá vistu vit ikki, at hetta var okkara seinasta máltíð saman við tær.

Góða Katrin, vit takka tær fyri allar tær ógloymandi og hugnaligu løtur vit høvdu saman við tær á Leynarvatni, í Havnardali og á keiini í Leirvík. Vit eru sera takksom fyri alt tú hevur verið fyri okkum.

*Farvel, farvel, mine venner,*
*Jeg smiler og tager afsked.*
*Nej, fæld ingen tårer,*
*Jeg har ikke brug for dem.*
*Jeg behøver blot jeres smil.*

*Føler i jer triste, så tænk på mig.*
*Det er, hvad jeg ønsker mig.*
*Når man bor i hjertet hos dem, man elsker,*
*Må man huske, at man aldrig dør.*

Ærað veri minnið um svigarmammu mína Katrin Skarðhamar.

**Thyra Skarðhamar**

**Dagurin**

**2. mai. Atanasius**, deyður í 373. Patriarkur í Aleksandria. Var kendur kirkjulærari, og hevur sett saman eina trúarjáttan, sum varð samtykt í Nikæa í 323, og sum ber navn hansara.

**3. mai. Krossmessa**. Var hildin til minnis um, at keisarinnan Helena fann Kristi kross. Á krossmessu sigst tjaldrið at hava fult reiður, kavi at vera í hvørjari íðu og sólja í hvørjari veit; men teir halda, at hetta er ov tíðliga, og at meint verður við gomlu krossmessu, ið er 15. mai. Krossmessusnertur er knappligt illveður, sum kann bresta á um hetta mundið. Í 1943 var eitt fólkatingsval í Føroyum, sum var rópt krossmessuvalið. Símun av Skarði varð føddur hendan dagin í 1872.

**4. mai. Florianus**, deyður umleið ár 300. Rómverskur heryvirmaður og embætismaður, sum royndi at bjarga kristnum fólki, ið vórðu forfylgd, men hann varð sjálvur tikin og fyribeindur.

**5. mai. Gotthard**, deyður í 1038. Abbati og biskupur í Hildesheim. Týskt navn, samansett av orðunum fyri Gud og harður.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan **við Arnfrið Heiðar Bjørnsson** úr Vestmannaoyggjunum, búsitandi í Tórshavn, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 15.

**Andreas Andreassen**, vanliga nevndur Andreas í Tarti, í Oyndarfirði andaðist á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík mánadagin, 101 ára gamal.

**Liv Olsen**, kona Óla Jákup Olsen á Deil í Vestmanna andaðist flagdagin í Noreg, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður á Nøtterøy fríggjadagin.

**Katrin Skarðhamar** andaðist í Herborg sunnumorgunin 60 ára gomul. Kistan kemur í Vágar fríggjadagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður og pápi okkara

**Arnfrið Heiðar Bjørnsson**

andaðist mánadagin 28. apríl, 60 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin klokkan 18.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin klokkan 15.

**Oda, Elsa, Helga, Hallberg og Ólafur**